Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstoðin

Ein provokatión móti føroyingum og skynsemi

Oddagrein

SEINASTA brævið frá løgmanni til forsætisráðharran um komandi samráðingarumfar vísir greitt, at landsstýrið – ella løgmaður – vil hava samráðingarnar lidnar. Í øllum førum eftir verandi leisti. Harafturat kann brævið lesast sum ein provokatión, tí samráðingarnar verða í Keypmannahavn og ikki í Føroyum, sum stjórnin skal hava lovað, tá partarnir samráddust seinast.

ENN hava vit ikki hoyrt, hvat danska stjórnin sigur til, at landsstýrið ikki vil samráðsat um eina búskaparliga skiftistíð, tí hesa skiftistíð ætlar landsstýrið at klára uttan danska luttøku. Heldur ikki hava vit hoyrt, hvat stjórnin sigur til, at trý øki skulu samráðast upp á pláss undan samráðingunum tann 26. oktober. Hesum skulu embætismenn og ráðharrarnir á hesum økjum standa fyri. Men neyvan fer stjórnin glaðbeint at góðtaka hetta útspæl løgmans.

TAÐ kann tykjast, at landsstýrið provokerar donsku stjórnina við hesum uppskotinum um samráðingargongd. Men í øllum førum provokerar landsstýrið okkara fólkavalda ting. Avtalað er, at uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum skal hava allar týðandi upplýsingar um samráðingarnar og tilgongdina í fullveldisætlanini. Okkum er upplýst, at uttanlandsnevndin er ikki kunnað um seinasta brævið frá landsstýrinum til stjórnina. Heldur ikki er uttanlandsnevndin kunnað um nógv umrøddu brøvini til ST og NATO, sum landsstýrið kortini roynir at tileinkisgera. Framferðin í hesum trimum førum bøtir ikki um umdømi landsstýrisins, sum frammanundan ikki er serliga gott. Sambært seinastu veljarakanningini hevur landsstýrið ikki meirilutan aftan fyri seg í Løgtinginum. Heldur ikki fær landsstýrið meiriluta fyri fullveldisætlanini.

AT løgmaður ger støðuna upp er skilligt. Hann og tegnar hans kunnu ikki eina fjórðu ferð koma frá samráðingum sum av torvheiðum. Nú má eitt veruligt frambrot henda, um haldast skal fram eftir tí løgdu kósini. Men spurningurin er, um landsstýrið ikki hevur gjørt støðu sína verri við hesum seinasta brævinum, og við ætlanini at halda skiftistíðina uttan fyri samráðingarnar.

TAÐ undrar óivað bæði stjórn og føroyingar sum heild, at landsstýrið skal sjálvt klára skiftistíðina, tí hon hevur verið og fer at verða størsti spurningurin. Ein føroyskur búskapargrunnur fer ikki – hóast nógv fløðir í landskassan – at fáa eina slíka stødd, sum er neyðug, um hann skal vera búskaparliga bolverkið og gjalda hallið í landskassaroknskapinum, tá tann fýra ára langa skiftistíðin er farin afturum. Brævið og ætlan landsstýrisins tykist tí at vera ein provokatión móti føroyingum og vanligum skynsemi.

Sosialurin

Sjónvarpið sendir OL úr Sydney

Fríggjamorgunin kl. 08.50 verða olympisku leikirnir settir í Sydney í Australia. Sjónvarp Føroya fer at senda haðani beinleiðis í tríggjar tímar.

Olympisku leikirnir fara eisini at seta dám á skránna hjá sjónvarpinum komandi vikurnar. Sjónvarpið hevur avgjørt at samsenda við Danmarks Radio, sum teir næstu 14 dagarnar fer at senda einar 300 tímar frá OL í Sidney.

OL-skráin hesar dagarnir fer at liggja rættuliga føst:

Sjónvarpið byrjar hvørt kvøld kl. 23.00 at samsenda við DR og senda út í eitt til kl. 13.00 dagin eftir.

Kl. 17.30 hvørt kvøld verður so ein samandráttur av tí, sum er hent um náttina.

Hvørt kvøld kl. 22 verður ein tími við undirhaldi, har tilfarið hevur eitthvørt samband við OL, og aftaná tað, kl. 23 verður so aftur sent beinleiðis úr Sydney til kl. 13 dagin eftir.

Hetta verður so lagið teir næstu 14 dagarnar til 1. oktober tá leikirnir enda.

Tvørkirjuligur bønardagur á Hotel Føroyum

Leygardagin 7. oktober verður Hotel Føroyar karmur um ein tvørkirkjuligan bønardag. Byrjað verður við morgunmati (kaffi/te og rundstykkjum) kl. 09.00. Ætlanin er at halda á til í mesta lagi kl. 14.00. Undir dagsheitinum: „EITT LIVANDI SAMFELAG“ savnast trúgvandi úr øllum landinum til bøn fyri landi og fólki okkara. Hugsjónin er, við minst 1000 forbiðjarum, at gera veg fyri Guðs ríki og vilja Hansara inn í alt okkara samfelag soleiðis at vit gerast eitt ljós fyri aðrar tjóðir, og at vit samstundis gerast ein útsendingarmiðdepul fyri heimsmissión.

Stigtakarar eru Dánial Gaardlykke úr Saltangará og Frank Jacobsen úr Tórshavn. Tiltakið er óheft av øllum samkomum/kirkjum í landinum. Ein fimm manna arbeiðsnevnd er sett at taka sær av tí praktiska arbeiðinum. Í nevndini sita: Dánial Gaardlykke, Stanley Olsen, Frank Jacobsen, Eivinn Bringsberg og Jaspur Johannesen.

Við yvirnevnda arbeiðssetningi heitir nevndin á lesaran at vera við at vinna land og fólk okkara fyri Kristus. Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 55,- við morgunmati íroknaðum. Byrjað verður at biðja kl. 10.00. Biðið verður fyri viðkomandi samfelagsviðurskiftum, politisku støðuni, mission, reinleika og Ísrael, umframt øðrum viðkomandi evnum. Tú kanst tekna teg til luttøku við at flyta kr. 55,- til:

1000 F.F.F., konto nr. 1313403 í Føroya Sparikassa og viðmerkja navn títt á inngjaldið.

Havnar Hornorkestur venur aftur

Vit spyrja ikki um aldur. Vit spyrja ikki um kyn. Hava tit spælt áður, ella hava hug at taka lut í felagsspæli, so eru tit vælkomin í Havnar Hornorkestur.

Soleiðis sigur hornorkestrið í tíðindaskriv í sambandi við, at venjingarnar nú byrja aftur. Havnar Hornorkestur er eitt sera virkið felag. Higartil í 2000 hevur Havnar Hornorkestur spælt til umleið 15 ymiskar almennar framførslur. Venjari hjá orkestrinum er Ove Olsen.

13. februar ár 2003 verður Havnar Hornorkestur 100 ár. Hetta verður hátíðarhildið á ymiskan hátt, og heldur orkestrið, at tað hevði verið stuttlig, um TÚ eisini vart við.

Havnar Hornorkestur venur á Havnar Skansa kl. 20^{00} til 22^{00}, mánakvøld og hóskvøld.

Tey, ið vilja vita meira, kunnu tit ringja til Kára á 316585, Jonhard á 315154, ella Olaf á 315915. Eisini ber til at koma á Skansan áðurnevndu tíðarskeið.

Viðmerking:

14. september

Í dag eru 54 ár síðani, at ein demokratiskur meiriluti av Føroya fólki samtykti, at land okkara frá hægstu fjallatindum til ytstu havmið skuldi gerast eitt sjálvstøðugt ríki, sum skuldi luttaka í altjóða samstarvi við onnur ríki í tann mun, sum tað kundi gagna tjóð okkara.

Síðani hava vit mangan á hesum degi havt samkomur, har vit hava minst til henda varða í søgu okkara. Men í dag verður lítið gjørt burtur úr.

Orsøkin til hetta er tann einfalda, at hvørt er til sína tíð. Ein er tíðin til at minnast gomul brøgd, ein onnur er at fremja nýggj.

Tað sum vit samtyktu í 1946 verður nú sett í verk.

Tað sum hent er, er tað einfalda, at eftir okkara fólkatkvøðu í 1946 kom ein sendinevnd við teimum fremstu donsku politikarunum til Føroyar við ferðamannaskipinum Hroar. Teir høvdu fundi við føroysku politikararnar, og teir góvu teimum tað lyfti, at vit skuldu fáa allan tann studning sum vit skoyttu um, um so var, at vit ikki settu fólkaatkvøðuna í verk.

Hesum trúðu nóg nógvir føroyskir politikarar, og tí løgdu teir fólkaatkvøðuna á ís og royndu at samstarva við donsku stjórnina.

Tað sum síðani er hent vita vit øll.

Tá vit í 1992 veruliga komu í trupulleikar og høvdu brúk fyri hjálp, tá kom eingin hjálp frá Danmark. Tá róku teir donsku politikarnir spott á okkara samráðingarmenn og beittu donsku fjølmiðlarnar efir teimum. Vit vóru lýstir sum nakrir ræðuligir nassarar, tá okkara politikarar púra einfalt vildu hava danir til at halda tað, teir høvdu lovað okkum.

Tað er greitt, at eitt slíkt lyftisbrot fær sínar avleiðingar. Í Føroyum hendi tað, at tann 30. apríl 1998 atkvøddi ein stórur meiriluti av løgtingsveljarunum fyri flokkum, sum vildu seta í verk eina skipan av sama slag sum ta, Ísland fekk við Danmark í 1918. 1. desember 1918 gjørdist Ísland eitt sjálvstøðugt ríki, sum kundi reka sín egna uttanríkispolitikk.

Eina slíka skipan er tað, sum vit nú fara at fáa okkum, og tí bendir alt á, at næsti 14. september verður hildin í einum frælsum Føroyum, sum hevur sett fólksins vilja í verk.

Zakarias Wang

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og á annan hátt stuðlaðu, tá okkara kæra kona, mamma og omma

LYDIA JONA JOHANNESEN

doyði og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum og øll tey, sum vóru um hana til tað seinasta. Tøkk til prestar, kirkjutænarar, sangarar, gravara og øll tykkum, sum á ein hvønn hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina. Tøkk fyri blómur, kransar og uppringingar. Eina hjartans tøkk til øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
Christian, børn og ommubørn

Breið undirtøka fyri skattaábót

Allir tríggir andstøðuflokkarnir taka undir við uppskoti Fólkafloksins um skattaábøtur fyri fólk við lág- og miðalinntøkum

JOHN JOHANNESSEN

Uppskotið hjá Fólkaflokkinum um at hækka botnfrádráttin í skattinum hjá lág- og miðalinntøkunum fær góða undirtøku millum andstøðuflokkarnar.

Formenninir í teimum trimum andstøðuflokkunum taka allir fult undir við grundhugsjónunum í uppskotinum.

Vil viðgera nærri

Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum heilsar uppskotinum vælkomnum og býðir sær at viðgera uppskotið nærri saman við Fólkaflokkinum, soleiðis at eitt gott úrslit kemur burturúr.

Javnaðarflokkurin hevur sambært Jóannes Eidesgaard seinastu tíðina arbeitt við einum líknandi uppskoti og er til reiðar at tengja tað saman við tí hjá Fólkaflokkinum, um neyðugt.

– Hevur Óli Breckmann hug at føra hetta uppskotið út í verki, er bara hjá honum og Fólkaflokkinum at koma til arbeiðis, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

Skattalætti neyðugur

Edmund Joensen úr Sambandsflokkinum sigur seg avgjørt vera sinnaðan at tosa nærri við Fólkaflokkin um uppskotið.

– Tað er einki at ivast í, at ein skattalætti til tey lágløntu er neyðugur, og tí taka vit sjálvsagt undir við einum slíkum uppskoti, sigur Edmund Joensen.

Jenis av Rana úr Miðflokkinum sigur seg eisini kunna taka undir við einum uppskoti, ið er til fyrimuns fyri tey veiku.

Formaðurin í Miðflokkinum vísir á, at hóast tað stendur í samgonguskjalinum, at virkast skal fyri skattalætta, hevur hetta higartil bert verið til fyrimuns fyri tey meira mentu. Í hesum sambandi sipar Jenis av Rana til partafelagsskattin, sum er endurskoðaður.

– Men at Fólkaflokkurin nú kemur við einu uppskoti, ið hjálpir teimum veiku, er bara gott, staðfestir Jenis av Rana.

Samgongan varin

Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin, sum umframt Fólkaflokkin eru í samgonguni, eru varnir og taka ikki uttan fyrilit undir við uppskotinum frá Fólkaflokkinum.

Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum vísir á, at føroyski búskapurin er ovurupphitaður í løtuni, og tí eiga vit at vera varin við at lækka skattin uttan fyrilit.

Men Høgni Hoydal tekur undir við grundhugsjónini um, at skattapolitikkurin skal broytast, soleiðis at hann kemur teimum lágløntu til góðar.

– Tað ber ikki til, at arbeiðsfólkini skulu bera byrðuna, meðan onnur kunnu vinna stórt uppá at umseta fiskidagar og fiskiloyvi, uttan at tað kemur almenninginum til góðar, staðfestir Høgni Hoydal.

Tjóðveldisflokkurin vil sambært Høgna Hoydal til eina og hvørja tíð viðgera føroyska skattapolitikkin, men hann roknar ikki við, at Tjóðveldisflokkurin uttan fyrilit fer at taka undir við uppskotinum hjá Fólkaflokkinum.

Sámal Petur í Grund úr Sjálvstýrisflokkinum heldur ikki, at tað ber til at lækka skattin samstundis sum vit arbeiða fyri at fáa fullveldi og samfelagið er ovurupphitið.

Vit skulu í staðin miðja eftir at fáa brúkt hvørja skattakrónu betur, heldur Sámal Petur í Grund.

Men Sámal Petur í Grund tekur kortini undir við grundtankanum hjá Fólkaflokkinum um, at botnfrádrátturin skal lækkast. Tað skal bara ikki vera júst nú.

Tí fer Sjálvstýrisflokkurin ikki at atkvøða fyri uppskotinum, um tað kemur á tingborð.

Karsten skal leggja tað fram

Óli Breckmann, sum vegna Fólkaflokkin stendur aftan fyri uppskotið, ætlar sær ikki at leggja uppskotið fyri tingið.

– Uppskotið er eitt signal til Tjóðveldisflokkin um, at samgonguskjalið skal haldast, sigur Óli Breckmann.

Formaðurin í Fólkaflokkinum heldur, at tað eigur at vera Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ið leggur fram uppskot um at lækka skattin, sum samgonguskjalið eisini staðfestir.

Grein 4 og 5 í samgonguskjalinum siga, at skatta- og avgjaldstrýstið á húsarhald og framleiðslu skal linkast, og skattafría grundupphæddin skal vera so høg sum møguligt.



Kom uppskotið hjá Óla Breckmann um skattalætta fyri tingið, hevði tað uttan iva verið samtykt av breiðum meiriluta í andstøðu

Árliga heystkonsertin hjá Symfoniorkestrinum

22. oktober hevur Føroya Symfoniorkestur sína árligu heystkonsert. Henda konsertin verður heldur fjølbroyttari enn vanligu symfonikonsertirnar. Á skránni vera fýra verk. Byrjað verður við serenatu fyri 13 blásarar av Richard Strauss. Her fáa træblásararnir ein møguleika at vísa teir ljómmøguleikarar, sum liggja í »træblásaradeildini« í einum symfoniorkestri. Verkið er fyri tvær floytur, tvær oboir, tvær klarinettir, tvær fagottir, fýra horn og kontrafagott/kontrabass.

Næsta verkið á skránni er kenda violinkonsertin eftir Felix Mendelsohn við Sámali Petersen sum solisti. Kanska kendasta og mest spælda verkið fyri violin og orkestur úr romantiska tíðarskeiðinum.

Eftir steðg verður eitt annað forkunnugt verk á skránni. Her fáa „messingblásararnir“ í orkestrinum annan ljóm-møguleikan í einum symfoniorkestri. Hetta verkið eftir Chris Hazell hevur heitið Three Brass Cats og Another Cat, KRAKEN fyri trompetir, trombonir, waldhorn og tuba.

Seinasta verkið á skránni er Pastoral suita eftir svenska tónaskaldið Lars Erik Larsson. Ein tónamálningur av svenska landslagnum. Samanumtikið ein sera áhugaverd og avbjóðandi skrá, sum vit vóna verður væl vitjað og móttikin.

Helveg skal standa skúlarætt

Báðir teir føroysku fólkatingslimirnir hava sent danska uttanríkisráðharranum skrivligan fyrispurning um NATO málið

JOHN JOHANNESSEN

Niels Helveg Petersen skal um átta dagar skrivliga svara báðum føroysku fólkatingslimunum og fólkatinginum, um hví hann sigur fyri landsstýrinum, at Føroyar skulu hava her fyri at gerast limur í Partnership for Peace.

Ein kelda, sum stendur NATO nær, hevur í brævi gjørt landsstýrinum greitt, at Føroyar saktans kunnu gerast limir í Partnership for Peace. uttan at hava vápnaða megi.

Tá svarið kemur frá Niels Helveg Petersen, verður tað roknað sum eitt svar til alt fólkatingið. Tí kann hann koma í trupulleikar, um hann gevur skeivar upplýsingar.